Árni Skaale
Beinir Johannesen
Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
Jacob Vestergaard
Jørgen Niclasen
vegna Fólkaflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
(Árlig javning av landsskattastiganum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (Ásetingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 30. apríl 2025 verða aftan á § 1, stk. 1 sum nýggj stk. sett:

"*Stk. 2.* Við løgtingslóg verður skattastigin sbrt. stk. 1, nr. 1-6 fyri komandi árið javnaður við prosentvísa vøkstrinum í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í tólv mánaða skeiðnum, sum endaði 1. oktobur í árinum fyri. Roknaðu stigini sbrt. pkt. 1 verða rundaði upp til nærmastu kr. 1.000.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið leggur fram uppskot til løgtingslóg sbrt. stk. 2 fyri 8. mars á hvørjum ári."
Stk. 2 verður eftir hetta stk. 4.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Almennar viðmerkingar
Seinastu árini hevur føroyski búskapurin havt stóra framgongd. Hetta hevur havt sína ávirkan, tí vit hava samstundis havt stóran lønar- og prísvøkstur í Føroyum. Serliga hevur prísvøksturin tvey tey seinastu árini gjørt fíggjarstøðuna hjá mongum ringa.

Landsskattastigin hevur tó – inntil tey seinastu tvey árini - verið óbroyttur síðani 2016. Tað hevur merkt, at størri partur av lønini so líðandi er lyftur upp á hægri skattastig, og at borgarar tí eru vorðnir skattaðir alsamt harðari.

Við uppskotinum verða á hvørjum ári mørkini í landsskattastiganum fyri komandi ár við løgtingslóg javnaði við
prosentvísa vøkstrinum í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í tólv mánaða skeiðnum, sum endaði 1. oktobur í árinum fyri. Roknaðu mørkini verða rundaði upp til nærmastu kr. 1.000 fyri at halda skattastigan einfaldan.

Landsstýrisfólkið leggur fram uppskot til løgtingslóg um javning av skattastiganum fyri 8. mars á hvørjum ári, fyrstu ferð í 2026. Uppskotið um javning skal sostatt leggjast fram tíðliga á árinum, og hevur hetta til endamáls, at løntakarar í góðari tíð frammanundan kenna skattligu fortreytirnar fyri komandi árið. Skipanin fær virknað fyri skattaárið 2027 og frameftir.

Henda skipan fer at byrgja fyri, at skattatrýstið fer at vaksa av sær sjálvum, eins og undanfarnu árini, har politiska skipanin hevur latið staðið til heldur enn at tillaga skattastigan samsvarandi lønarvøkstrinum.

Avleiðingar av uppskotinum
Tað er ilt at meta neyvt um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum, men tó verður tað ikki mett at hava neiliga ávirkan á landskassan.

Við verandi skipan hækka inntøkur landskassans frá landsskatti á hvørjum ári, so hvørt lønarstøðið hækkar, men hinvegin er greitt, at lønarinntøkur ikki eru givnar, men eru stýrdar av arbeiðsútboði, sum aftur er stýrt av m.a. galdandi marginalskatti. Tá alsamt størri partur av lønarinntøkuni lyftir seg upp á hægri skattastig, so hvørt lønirnar vaksa, økist skattatrýstið av sær sjálvum á hvørjum ári, og tað kann tilskunda fólki at halda meira frí, tí síðst vunnu krónurnar verða lutfalsliga harðast skattaðar, meðan frítíð er skattafrí.

Tá skattatrýstið sambært uppskotinum ikki longur fer at vaksa av sær sjálvum, hevur tað við sær ein mistan vøkstur í landsskattainntøkum fyri landskassan, sum annars hevði verið eftir galdandi skipan, men so heldur støðuga skattliga tilskundanin til at halda meira frí eisini uppat.

Uppskotið hevur tær møguligu umsitingarligu avleiðingar, at kt-skipanirnar hjá TAKS skulu stillast á hvørjum ári við nýggjum landsskattastiga.

Til § 1
Á hvørjum ári verða mørkini í landsskattastiganum fyri komandi ár við løgtingslóg javnaði við prosentvísa vøkstrinum í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í tólv mánaða skeiðnum, sum endaði 1. oktobur í árinum fyri. Roknaðu mørkini verða rundaði upp til nærmastu kr. 1.000.

Landsstýrisfólkið leggur fram uppskot til løgtingslóg fyri 8. mars á hvørjum ári, fyrstu ferð í 2026.

Fyrstu ferð javnað verður eftir hesum leisti er fyri skattaárið 2027. Hetta merkir, at fyri 8. mars 2026 leggur landsstýrisfólkið fram uppskot til løgtingslóg um javning av landsskattastiganum fyri 2027, sum avspeglar vøksturin í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í tólv mánaða skeiðnum, sum endaði 1. oktobur 2025.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 28. august 2025

Árni Skaale Beinir Johannesen

Jacob Vestergaard Jørgen Niclasen

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur